## DAGSINS MEINING

# Blokkniðurskurðurin og ráðgevingin

Tað gevur nakað at hugsa um, at arvaða hallið á fíggjarlógini fyri 2004 er á leið tað sama sum blokkniðurskurðurin, ið undanfarna samgonga framdi. Tað gevur eisini nakað at hugsa um, at somu ráðgevar, ið nú tosa um, hvussu ein skattalætti lækkar um inntøkurnar hjá landskassanum einki varskó róptu, tá blokkkurin bleiv niðurskorin við einari upphædd, ið svarar til eina millión um dagin. Hvør hugdi at árinunum á livistøðið í Føroyum? Hvør hevur sagt, at ein slíkur niðurskurður bar til, uttan stórar sparingar í almennu útreiðslunum? Hvar vóru alarmklokkurnar?

Andstøðan og einstaklingar vístu á, hvussu tað var óðamannaverk at skera blokkin við so stórari upphædd í einum við grundarlagi í tølum, ið bert vóru, tí Føroyar vóru á aldukambinum av einum hákonjukturi. Hetta var sum øllum kunnugt sum at sletta vatna á gás. Blokkniðurskurðurin var framdur, og nú sita vit her við stórum halli á fíggjarlógini, tí at undanfarni landsstýrismaður í fíggjarmálum legði fram eina fíggjarlóg við alt ov bjartskygdum inntøkumetingum. At ein radikal broyting er hend seinastu mánaðarnar er skeivt. Rækjuvinnan og alivinnan hava rópt varskó í fleiri ár, og tí kann tað ikki koma óvart á nakran, at kreppan endiliga byrjar at síggjast á landskassans inntøkum. Kemur hetta óvart á nakrastaðni, so er ov illa arbeitt. Heldur ikki kann tað koma óvart á nakran, at blokkniðurskurðurin kemur at hava álvarsligar fylgjur.

Hví gjørdu eitt nú Búskaparáðið ella Landsbankin ongar útrokningar av ávirkanini av blokkniðurskurðinum? Fyri at fáa 366 milliónir inn í landskassan í skattainntøkum frá eitt nú útflutningsvinnuni, so skal útflytast fyri væl meiri enn eina milliard, fyri at fáa tilsvarandi upphædd. Hví kom eingin yvirvísmaður út og ávaraði um vandan í at disponera út frá gullárum, heldur enn at taka í hvussu so er eina miðaltalsáskoðan ella, sum tann varni vildi gjørt, eina áskoðan baserað uppá ein búskaparligan aldudal?

Hetta varð ikki gjørt, og tí má okkurt verða galið við skipanini.

Tað er sjálvsagt gott, at vit hava eitt búskaparráð, men vit loyva okkum at seta spurning við, um ikki eitt mark fyri, hvussu leingi man kann sita í ráðnum ella í hvussu so er sum formaður, átti at verið. Hetta kenna vit aðrastaðnis frá, har man skiftir búskaparligar vísmenn út við millumbili, fyri at tryggja innspræning av nýggjum tonkum. Búskaparfrøði er ikki absolutt vísund, og tí eigur útskifting at verða við millumbili í einum forumi sum Búskaparráðið, so at dogmatiskar uppfatanir ikki fáa tíð at grógva seg fastar, men at allar uppfatanir støðugt verða endurumhugsaðar og viðgjørdar objektivt. Hetta merkir ikki, at tey, sum undan hava gingið vera kasserað, men bert at teirra tíðarskeið er runnið, og at tey víkja plássið fyri nýggjum fólkum við nýggjum áskoðanum. Er hetta ikki vert at umhugsa!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til tíðindi í útvarpinum í mánakvøldið

**Jan Mortensen**
*Vinnuhúsið*



Útvarp Føroya bar í gjár tíðindi, ið skilliga høvdu til endamáls at seta Vilhelm M. Johannesen í ringt ljós undan komandi aðalfundinum í Havnar Handverksmeistarafelag. Útvarpið siteraði ónavngivnar keldur og samstundis var víst til innanhýsis starvsfólkaviðurskiftir í Vinnuhúsinum.

Vilhelm M. Johannesen hevur lagt frá sær sum formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag, so stríð um hansara persón ikki skal skaða feløgini. Hesa avgerðini virða bæði leiðsla og starvsfólk í Vinnuhúsinum, og vit kunnu samstundis staðfesta at einki útistandandi er millum Vinnhúsið og Vilhelm M. Johannesen, hvørki viðv. fundarpeningi ella í persónligum viðurskiftum við starvsfólki.

Vit eru ikki og ynskjast ikki at gerast partur av einum maktstríði innan Handverksmeistarafelagið.

Víst verður annars til tíðindaskriv frá fríggjadegnum.

# Orsaka eg spyrji - Hermann

**Tað undrar stórliga, at Hermann Oskarson, nú hann er komin í andstøðu, byrjar at úttala seg**



**Meining Marjus Dam**

Valevnisuppskot hjá Tjóðveldisflokkinum undan valinum, røðari hjá Hesuferð o.s.v skírir nú annan búskaparfrøðing at hava partapolitiskan lit. Ein kann spyrja – hví ikki tað?. Er tað bert Hermann Oskarson, ið hevur rætt at hava partapolitiskan lit – ímeðan onnur ikki hava tað?

Sum løgtingslimur í nøkur ár, so undrar tað ikki sørt, at formaðurin í Búskaparráðnum nú brádliga er ímóti, at ein skattalætti verður framdur.

Hann óttast fyri, at almennu kassarnir fara at tørva pening, uttan tó at nevna, at ídag ræna almennu kassarnir tann privata so nógv, at tey, ið arbeiða, neyvan hava eftir til lúsasalvu, tá tey hava verið ígjøgnum almennu skattapressuna. Tað er veruleikin ídag. Um onki skilagott verður gjørt, so drepur skatturin hønuna, ið verpur gullegg, nevniliga øll tey fólk her á landi, ið arbeiða.

Tað sum undrar enn meira er, at Formaðurin í Búskaparráðnum, ið sum fakmaður á økinum átti at komi við metingum um t.d. avleiðingar av, at ríkisveitingin var skerd á sinni - ikki kleyv í tvey. Hetta var ein politisk avgerð – ið hann onki hevði við at gera, segði hann.

Eg spyrji enn, hvat og hvar niðurstøðurnar og kanningarnar hjá búskaparráðnum vóru tá. Vóru tær hildnar aftur, ella ikki gjørdar - tí formaðurin var í partapolitiskum hafti?

Ella hevði tað ongar fíggjarligar avleiðingar at ein triðingur av ríkisveitingini varð skerd burtur? Eftir stendur, at Búskaparráðið onki boð er komið við tá størsta inntriv í føroyskan búskap nakrantíð varð gjørt – nevniliga skerjingin av ríkisveitingini við 366,4 milliónum krónum eftir einari nátt.

Eg haldi, at tað er undarligt, at formaðurin í búskaparráðnum og búskaparráðið onki gjørdi ella segði tá.

Tað er eitt politiskt mál at skerja skattin, so føroyingar kunnu liva í Føroyum. Tað hevur samgongan set sær fyri. Hví skal Oskarson úttala seg um hetta politiska mál, tá hann ikki kundi úttala seg ríkisveitingina á sinni, tí tað var eitt politiskt mál?

Kann hugsast, at Hermann Oskarsson rennur partapolitisk ørindir, nú hann sjálvur skýrir onnur at gera tað?

Og somuleiðis kundi verið áhugavert at fingið at vita, nær Hermann Oskarsson úttalar seg sum búskaparfrøðing og nær hann úttalar seg sum tjóðveldismann. Mær tykist, at tað í løtuni ikki er nakað skott ímillum hesi viðurskiftir. Og tað átti tað so avgjørt at verið.

Hevði formaðurin í búskaparráðnum onga hóming av, at hallið á fíggjarlógini í ár kom at vera 400 milliónir krónur? Tí tað vísti búskaparfrøðingur sambandsfloksins á fyri knøppum árið síðan. Men var onki sagt av búskaparráðnum undan valinum – tí at formaðurin vildi fjala tað til eftir valið?

Eg haldi, at Hermann Oskarson visti alt um hallið á fíggjarlógini í ár, men at hann tagdi um viðurskiftini, tí fakligi neutraliteturin er horvin í tjóðveldisleypinum. Um búskaparráðið ikki hevði nakra hóming av hallinum, so kann ein undrast á fakliga førleikan hjá hesum ráði. Tí annar búskaparfrøðingur visti hetta fyri langari tíð síðan. Men hóast hann hevði annan lit enn H Oskarson, so var fakliga meting hansara tíverri røtt, so syrgiliga røtt – og samsvarar ógvuliga væl við tað í fíggjarmálastýrið borðreiðir við nakrar dagar eftir valið. Men sum alment varð avnoktað beint undan valinum (citat Høgni Hoydal: "fantastiski fíggjarpolitikkurin hjá K.Hansen"). Hall 400 milliónir áðrenn ávdráttir. Ikki eiti á. Tað einasta fantastiska er eitt fantastiska stórt hall.

Tað verður eitt fíggjarligt upptak eftir tjóðveldisflokkin – sum vanligt.

Men skatturin skal niður, so fólk aftur kunnu arbeiða. Tað má Oskarson instilla seg uppá.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Johan Samuelsen og søgufalsan

**Høgni Hoydal**



Johan Samuelsen vil í grein vera við, at Tjóðveldisflokkurin ikki hevur samstarvað um at vinna føroyingum umboð í Norðurlandaráðnum, og síðani leggur hann eftir undirritaða fyri søgufalsan og eftir tjóðveldisfólki sum heild við alskyns niðurgering.

Harmiligt, at so nógv, sum verður gjørt í føroyskum politikki, skal byggja á fordómar og útspillingar. Johan Samuelsen tykist hava valt tað til sítt lívsstarv at spilla Tjóðveldisflokkin og tjóðveldispolitikarar út. Tað stendur honum frítt, og eg fari ikki at viðmerkja hansara afturvendandi og óteljandi útspillingar av mær.

Men eg góðtaki ikki, at hann spillir fólk út, sum eru farin hiðani av fold og sum ikki fáa vart seg. Og eg góðtaki heldur ikki, at hann leggur eftir øllum tjóðveldisfólki við ósannindum.

### Norðurlanda-umboðan á tingi

Tá tað snýr seg um umboðan føroyinga í Norðurlandaráðnum, er ongin orsøk at leita eftir ósemjum ella at falsa søguna, soleiðis sum Johan Samuelsen ger.

Løgtingið hevur verið samt um, at Føroyar skulu hava sjálvstøðuga umboðan í Norðurlandaráðnum.

Umboðanin í Norðurlandaráðnum hevur ongantíð verið gjørd til eitt stríð millum andstøðu og samgongu. Í 1978 og í 1979, tá samgongan millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin kundi havt valt sær bæði umboðini, valdi Løgtingið at geva andstøðuni annað umboðið, og hesum stuðlaði Tjóðveldisflokkurin sjálvandi. (Andstøðan valdi Paula Ellefsen úr Sambandsflokkinum).

### Framtøkini í Norðurlandamálum

Samstarvið um at vinna Føroyum limaskap og umboðan hevur eisini verið gott á Løgtingi. Og Johan Samuelsen átti at verið so mikið at sær komin, at hann eisini viðurkendi tað megnararbeiði, sum Erlendur Patursson, sáli, gjørdi fyri at vinna føroyingum umboðan og norðurlendska viðurkenning.

Erlendur Patursson átti uppskotið, sum hevur givið okkum núverandi støðu í Norðurlandaráðnum. Hann átti uppskotið um Norðurlandahúsið, og hann átti uppskotið um tingmannaráð Útnorðurs. Í góðum samstarvi við millum onnur Atla P. Dam, Thomas Arabo og Dánjal Paula í Búðini, vórðu øll hesi mál framd - og sjálvandi gjørdi eisini Petur Mohr Dam eitt stórt arbeiði til tess at vinna Føroyum umboðan í Norðurlandaráðnum longu afturi í 60'unum. Hvør hevur sagt nakað annað?

### Uppskotið hjá Erlendi í 1976

Viðvíkjandi núverandi støðu Føroya í Norðurlandaráðnum, var gongdin hendan:

Í 1976 leggur Erlendur Patursson hetta uppskot fram í Norðurlandaráðnum: "Nordisk Råd rekommanderer presidiet å utarbejde og forelegge rådet forslag om sådanne endringer i avtalen om Nordisk Råd, at Færøyene blir selvstendigt medlem af rådet like stilt med de øvrige".

Formansskapurin sendir landsstýri og løgtingi hetta til ummælis, og í 1977 leggur Atli P. Dam vegna landsstýrið fram uppskot til samtyktar um at stuðla uppskotinum hjá Erlendi Patursson. Uppskotið verður einmælt samtykt á Løgtingi 16. mars 1977.

Landsstýrið vendir sær síðani til danskar myndugleikar at fara víðari við málinum. Í 1980 leggur danska stjórnin fram uppskot í Norðurlandaráðnum um sjálvstøðuga umboðan fyri Føroyar og Grønland. Eftir ársfundin í Reykjavík í 1980 verður nevnd sett at viðgera málið - tann sonevnda "Petri-kommitéin". Nevndin viðger umboðanina hjá Føroyum, Grønlandi og Ålandi. Meiriluti í nevndini kemur kortini til ta niðurstøðu, at hon vil ikki viðmæla sjálvstøðugari umboðan.

Ístaðin skjýtur nevndin upp, at vit kunnu taka lut í Norðurlandaráðnum (við tveimum tingumboðum) og kunnu taka lut í Ráðharraráðunum og í embætismannanevndunum, sum sonevnd "sjálvstýrandi økir".

Eftir hesum uppskoti verða broytingar gjørdar í Helsinki-sáttmálanum í 1983, sum ásetur virksemi hjá bæði Norðurlandaráðnum (tingumboð) og Norðurlendska Ráðharraráðnum (stjórnarumboðini).

### Framstig seinnu árini

Hví Johan Samuelsen so skal leggja meg undir søgufalsan og leggja tjóðveldisfólk undir ikki at vilja gera framstig ella at siga "alt ella onki", er óskiljandi. Seinastu árini eru hesi mál framd í góðum samstarvi við m.a. Dan Reinert Petersen, Jóannes Eidesgaard og Jógvan við Keldu:

- Í 2000 vunnu Føroyar sær fastan sess í Norðurlendska Mentanargrunninum.
- Í 2002 skrivaðu íslendska stjórnin, grønlendska Landsstýrið og Føroya Landsstýri undir samstarvsavtalu um at styrkja Útnorðursamstarvið á ráðharrastigi.
- Í 2002 samtykti eitt samt løgting eftir uppskoti frá landsstýrinum aftur at søkja Norðurlandaráðið um fullgildugan limaskap. Hendan umsókn er til viðgerðar í løtuni.
- Í 2003 samtykti Norðurlandaráðið eftir uppskoti úr Føroyum og Íslandi, at samstarv við grannaøkini í Útnorði (Hetland, Skotland, Orkneyoyggjar, Hebridurnar, Írland, Ný Foundland o.o. kanadisk øki) skal raðfestast í Norðurlendskum samstarvi.

### Hví skal siðvenjan broytast nú?

Spurningarnir ið nú standa eftir, eru: Hví skal Løgtingið ikki framvegis standa saman um norðurlendskt samstarv og halda siðvenjuna fyri, at andstøðan eigur at velja annað umboðið hjá tinginum? Og fremur skrivingin hjá Johan Samuelsen virðiligt samstarv?

# Til verju fyri fólkaræðið: "Avtakið javnstøðulógina".

**Harry á Lakjuni**

Orðið demokrati kemur úr grikskum. (Démokra'tia, af démos, folk + kra'tein, herske, folkestyre), sigur fremmandaorðabókin. Fólkaræði, siga vit á føroyskum.

Fólk er eitt orð, sum ikki flokkar fólkið í kyn, men er eitt felagsheiti fyri bæði kynini.

Demokratiska styrkin ella vektin hjá tí einstaka liggur í atkvøðuni, t.v.s. at hin einstaki veljarin til eitt val kann velja tann persón, hann vil, treytað av at hesin er uppstillaður, sjálvandi - og øll hava vit sama rætt til at vera uppstillað. Soleiðis velja vit umboð á løgting - so sum vallógin fyriskipar.

Hetta, sum eg her havi sagt, skuldi verið óneyðugt at fortalt føroyingum, men er tað nú tað? Og tá eg seti spurnartekin, er tað tí, at tað tykjast vera nøkur, ið ikki hava skilt grundreglurnar í demokratinum.

Vit hava fyri stuttum havt eitt val til løgtingið, og úrslitið varð júst tað, sum fólkið valdi. Fólkið fekk sín vilja - og tað er gott. Men tað er ikki gott og ein smeitur fyri demokratiið, at formaðurin í eini nevnd (javnstøðunevndini), sum er vald av landsstýrinum, kemur fram í fjølmiðlunum eftir valið og sigur, at valið var ikki gott nokk. Tað skuldu verið fleiri kvinnur valdar, segði hon og róði fram undir nakað so ódemokratiskt sum kynskvotering.

At siga, at tað skuldu verið fleiri kvinnur valdar, er tað sama sum at siga, at tað skuldu verið onnur fólk, sum mannaðu tingið, enn tey, sum fólkið valdi. Tað vil siga, at landsstýrið hevur eina nevnd sitandi, sum við hond og fót arbeiðir ímóti grundreglunum í demokratinum. Slíkt verður kallað undirgravingarvirksemi, og er hetta ein háðan og ein niðurgering av dømikraftini hjá veljaranum - so tað forslær.

Sum borgarar kunnu vit ávirka veljaran at velja hendan ella hin - og tað er gott, men tað er ikki gott, at vit ímillum valini hava eina nevnd, valda við løgtingsins vælsignilsi, til at ávirka veljaran.

Tíbetur er demokratiið so fastgrógvið í føroyingin, at hann ikki letur seg tøla av ódemokratiskum javnstøðusnakki, men velur eftir síni egnu sannføring. Tíverri hava politikarar latið seg ávirka av hesum og sett eina sokallaða javnstøðulóg í gildi.

Orðið javnstøða klingar væl í oyrunum og ljóðar, sum um tað skuldi verið nakað gott og demokratiskt. Hetta kann skjótt fáa ein veikan politikara at blotna - og tí fingu vit javnstøðulógina. Men aftaná hava flest allir politikkarar ásannað, og helst eisini teir, ið samtyktu lógina, at hendan lóg er eitt haft um beinini á teimum sjálvum, men tað er líkasum eingin, ið torir at stíga fram og siga, at keisarin er nakin, at javnstøðulógin ikki hevur eitt vet av demokratii í sær, men er eitt fremmandalikm í tí politisku skipanini - eitt forstýrandi element.

Áðrenn kvinnan fekk valrætt, hevði hon sjálvandi lítlan og ongan møguleika at ávirka politikk beinleiðis, og tað var ikki gott, men eftir at hon fekk valrætt, hevur hon verið líkastillað við mannin og hevur kunnað ávirkað tað sama sum hann, sjálvandi. Sera einfalt, tí demokratiska styrkin ella vektin hjá tí einstaka liggur í atkvøðuni. Tað hevur veljarin skilt og góðtikið, men hann góðtekur ikki, at ein smøl nevnd skal diktera, hvussu hann skal velja. Veljarin er nevnliga gløggur og vakin og dugir beinanvegin at gjøgnumskoða, tá okkurt gongur hansara demokratiska frælsi ov nær.

So kann vera spurt, hví løgtingið er mannað 29 - 3 til menninar. Ein orsøk er helst, at veljarin følir seg provokeraðan og kennir, at hansara demokratiski rætt ur at velja er hóttur av javnstøðulógini og av kvinnusakskvinnunum annars, og tí í ávísari protest velur, sum hann ger. - Helst høvdu fleiri kvinnur sitið á tingi, um vit onga javnstøðulóg høvdu. Men høvuðsorsøkin er uttan iva tann, at menn eru menn, og kvinnur eru kvinnur. Ójavnin teirra millum sæst á flest øllum økjum og ger seg eisini galdandi, tá ið tað snýr seg um politiskt val, og sæst á valúrslitinum. Ein natúrlóg, ein natúrlig siðvenja, sum eingin lóg kann broyta.

Sum mann og kvinnu skapti hann tey, lesa vit um skapanina, tveir ójavnir skapningar, sum eingin lóg kann broyta. So tann, ið stríðir fyri javnstøðu millum kynini, stríðir ímóti gudunum til fánýtis, sum tikið verður til - ella rættari, stríðir ímóti skaparanum til fánýtis. Tað er júst tað, sum nú sjálvt kvinnusakskvinnurnar ásanna, nú tær meira ella minni desperatar kæra sína neyð um, at stríð teirra fyri javnstøðu hevur verið úrslitaleyst. Tó gevast tær ikki á hondum, men mæla til, at onnur ódemokratisk tiltøk verða sett í verk, so sum kynskvotering og "uppstramming" av javnstøðulógini.

Tað hevur ongantíð sum til hetta valið verið tosað so nógv um at skapa álit á ta politisku skipanina. Er tað nakað, sum hevur skatt hetta álit, so er tað javnstøðulógin, sum varð sett í gildi fyri 10 árum síðani, og sum var eitt stórt afturstig fyri eitt annars vælvirkandi demokrati. Avtakið hesa lóg, so at demokratiið kann fáa frið at virka óskert, frítt og optimalt - tá høvdu vit ivaleyst sæð fleiri kvinnur á tingi.